## DAGSINS MEINING

# Samgonga og andstøða semjast í eftirlønar-málinum

Gongdin seinasta samdøgrið bendir á, at tann nógv umrødda eftirlønin hjá landsstýrismonnum verður tikin av. Um tað letur seg gera, væl at merkja.

Landsstýrið fer helst at leggja eitt uppskot fyri Tingið um at taka av aftur ta nýggju skipanina um eftirlønir hjá fyrrverandi landsstýrismonnum. Í øllum førum eru formenninir í Tjóðveldisflokkinum og Sjálvstyrisflokkinum samdir um tað. Teir hava opinbart tikið seg saman í hesum máli, tí Fólkaflokkurin var ikki við í felags tíðindaskrivinum mánadagin. Og hann fer neyvan at seta seg upp ímóti einum máli, sum føroyska gøtufólkaræði hevur tikið í egnar hendur. Trýstið er bart út alt ov stórt, til at nakar, sum ætlar sær at halda fram á tingi, torir at standa ímóti.

Harafturat hava allit andstøðuflokkarnir greitt boðað frá, at teir kunnu taka undir við, at skipanin verður sett úr gildi, og at ein uttanveltað nevnd viðger spurningin og í framtíðini ásetir lønina og eftirlønina hjá landspolitikkarunum.

Men her er aftur eitt men. Sambært stýrisskipanarlógini ásetir Løgtingið sjálvt síni lønarviðurskifti, og tí er spurningurin, um tað er sambæriligt við hesa lóg, at ein uttanveltað nevnd skal greiða hesi viðurskifti.

Men líka so nógv, sum fólk hava øst seg upp um eftirlønina hjá landsstýris- og løgtingsmonum, líka so lítið hava fólk gjørt vart við ta vánaligu støðu okkara fólkapensjónistar eru í.

Tí eiga flokkarnir at taka uppskot Javnaðarfloksins til eftirtektar. Javnaðarflokkurin mælir nevniliga til, at politikkararnir fyrst fáa teimum, sum bara hava eina fólkapensjón at líta á, eina virðiliga pensjón. Henda samgongan setti sær fyri at loysa pensjónsmálið, og leingi hótti "fólkatryggingin" hjá Fólkaflokkinum í havsbrúnni, men henda er vónandi horvin med alla. Ístaðin eiga tingflokkarnir at virka fyri eini samhaldsfastari pensjónsskipan, sum breiða fjøldin av Føroya fólki kann fáa ágóðan av.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ein kærkomin rødd

**Leif Niclasen**

Tað var nú ein dagin, at ein eisini skuffaður fólkafloksmaður spurdi meg: »Er ongin, sum sigur nei-takk til hasa skammiligu pensjónina?« Nei, eg hevði onki hoyrt ella sæð. Men so kom Sosialurin tann 20. juli, har Hjørdis Djurhuus, einkja eftir Hákun løgmann, sigur bart út: »Eg ætli mær so avgjørt ikki at taka ímóti hasum 20 túsund krónunum«. Tað var sum kalt vatn til maktarleysa sál at hoyra hesa erligu rødd frá eini farnari tíð.

Vit, sum hava kent Hjørdis í meira enn hálva øld, vita, at hon er vælvitandi, gløgg, rætthugsandi og heiðurlig. Tað hevur hon so mangan víst bæði í skrift og talu. So sóu vit tað einaferð enn, at ein beskeðin einkja ger sjálvsøknum maktmenniskjum til skammar. Vit fegnast og kenna ogn í tær, Hjørdis.

Í samrøðuni við blaðmannin vísir Hjørdis á ein grundleggjandi sannleika og sigur: »Hetta tekur botnin undan øllum sjálvstýrishugsjónum«.

Ja, hatta er støðan í fáum orðum, og vit eru mong, sum mugu sanna, at slíkur menniskjakvalitetur í landsins hægstu størvum fremur ongan framburð og onki veldi av nøkrum slag.

Takk fái Hjørdis fyri síni erligu orð frá eini ð, tá vit høvdu menn, sum framdu fólksins vilja og vardu rættartrygdina. Teir brúktu síni evni og kreftir til fólksins frama, tí, sum Hjørdis segði, teimum dámdi tað.

Er nakar at finna í landi okkara, sum fólkið kann hava álit á?

---

# Kommunusamanlegging í skundi

**Bill Justinussen**



Nú hoyrdist um dagarnar, at Runavíkar og Skála kommuna hava ætlanir um samanlegging. Boðað varð frá, at ein fólkaatkvøða um málið verður í september mánaða.

**Upplýsing**
Ikki kann sigast, at nógv upplýsandi tilfar er latið borgarunum um hesa samanlegging. Og tí undrar tað meg, at ein fólkaatkvøða kann haldast longu í september-mánaða. Ein týðandi partur av fólkaræðisligu tilgongdini er júst tíð til upplýsing og búning av einum máli. Og hetta málið fær ikki umstøður at búnast eftir so stuttari tíð.

Eg havi fregnast eitt sindur eftir grundgevingum, sum kunnu sannføra borgarar í Runavíkar kommunu um møguliga rættleikan í eini samanlegging. Men ilt er at fáa eyga á tey kraftigu og sjálvsøgdu sjónarmiðini, sum áttu verið grundarlagið undir málinum.

Tí vil eg á henda hátt heita á Runavíkar Býráð sum skjótast at geva borgarunum eina frágreiðing um, hvørji øki verða betri og bíligari at reka við eini samanlegging og annars, hvørjar fyrimunir borgararnir sum heild kunnu vænta sær.

**Fyrimunir og vansar**
Landafrøðisliga er samanleggingin ikki tann mest eyðsýnda. Munandi nærri liggja bæði Nes og Gøtu kommuna. Og sum so eisini Stranda kommuna. Fíggjarliga verða fyrimunirnir helst meira hjá Skála kommunu, tvs. millum 30 og 40 milliónir. Barnagarður og dagrøkt er heldur ikki eitt øki, sum sjálvsagt er at samstarva um, tí frástøðan er ov stór. Og sama kann sigast um skúlaøkið. Vinnulívið finnur sjálvt út av at samstarva, og nýtist ongin kommunusamanlegging til tað.

Møguliga kann onkur fyrimunur vera reint umsitingarliga. Men at peningur verður spardur við at siga fólki úr starvi vegna dupultfunktiónir, er ikki ein grundgeving, sum heldur. Heldur meti eg, at tað við tíðini verður stríð um, hvar umsitingarøki skulu leggjast, og er vandin fyri miðfyrran av umsiting framvegis stórur eftir eina møguliga samanlegging. Og sum heild hevur uppsøgn av fólki við sparing fyri eyga ikki víst seg at vera nøkur gongd leið, um vit hugsa meira alment.

Vit kunnu eisini spyrja, hví kommunurnar í síni tíð fóru sundur. Væl veit eg, at kommunurnar í dag umsita munandi meiri økir, enn tær gjørdu tá, men framvegis áttu fyrimunir eisini tá verið við størri kommunueindum.

Hesir tankar eru meira hissini og ætlaðir sum í-skoyti til kjak.

**Áheitan**
Mín áheitan á báðar kommunurnar skal vera ikki at fara so skjótt fram. Umhugsið heldur eina størri samanlegging millum allar kommunurnar við Skálafjørðin. Fyrireikið og upplýsið væl, og komið síðani út til fólkið við spurninginum. Til seinast skal sigast, at tað er skilagott við borgarafundi um spurningin.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Suðuroy og Smyril!

**H. Palli Jacobsen**



Síðan eitt álit um økismenning var framlagt í VB-húsinum fyrr í ár, hevur nakað av orðaskifti verið um eina menning av Suðuroy.

Eitt mál, sum kemur at viðkoma Suðuroy sera nógv, er ein nýggjur Smyril! Hetta ovurstóra mál fyri Suðuroy hevur fingið lítla ella onga viðgerð í bløðunum. Støðan í dag er tann, at nevndin, sum Strandferðslan setti til at finna fram til eitt suðuroyarskip, er komið við sínum uppleggi og er hetta »pressað« politiskt ígjøgnum í landsstýrinum. Soleiðis úttalar landsstýrismaðurin í samferðslumálum um avgerðina at byggja ein so stóran nýggjan Smyril!

Um hesin Smyril verður bygdur og kemur at kosta uml. 300 mill., skal ein nýggj stór samferðsluhavn eisini byggjast. Hon er mett at kosta 70 mill. Henda er neyðug fyri at hesin nýggi Smyril kann leggja til bryggju í Suðuroy.

Tá so landsstýrið hevur sett eitt íløguloft fyri komandi ár, sum omanfyri nevnda íløga sprongir, hava vit í Suðuroy fingið ein trupulleika!

Sjálvt um eitt nýtt suðuroyarskip ikki beinleiðis er ein íløga í Suðuroy, so verða vit straffað av hesi stóru upphædd. Tey mál, sum fyri Suðuroy hava alstóran týdning, verða løgd á hillina.

Kunnu vit liva við hesum?

Eiga suðuroyingar ikki at prioritera eitt berghol millum Hov og Øravík fremst?

Eitt berghol, sum er altavgerandi fyri menning av einari felags Suðuroy?

Í sambandi við stóra menning innan fiskiídnað í Vági vísa vinnulívsmenn somuleiðis á, at ein havnarútbygging í Vági má gerast nú!

Eiga hesar ætlanir ikki at liggja framman fyri bygging av einum nýggjum Smyrli?

Hetta eru íløgur, sum hava sera stóran týdning fyri suðuroyingar og menning av oynni.

Teir pengar, sum vóru avsettir til forkanning av einum bergholi, mugu fyri alt í verðini ikki fara til »jólagávur« og politiskt stemmufiskarí upp undir komandi løgtingsval. Hetta má Bjarni Djurholm fyri alt í verðini fyribyrgja. Lat játtanina endiliga falla til tað hon var ætlað.

Ein víðkan av bergholinum til Hvalba eigur heldur ikki at verða gloymd!

Í slíkum politiskum spæli má oftast keypast og seljast. Soleiðis eigur eisini at verða gjørt í hesum máli! Eitt berghol Hov-Øravík kemur eftir ætlan at kosta umleið 100 mill. yvir eitt 2 til 3 ára skeið, meðan havnarbygging í Vági verður mett at kosta kanska 20 mill.

Um oman fyri nevnda smyrlaætlan verður framd, eru ongir pengar til hesar ætlanir. Hetta liggur rimmarfast frá Føroya landsstýri! Hvat er so at gera, hava vit nakað at selja ístaðin? Jú, tað hava vit heilt avgjørt! Hetta eigur at verða gjørt nú, áðrenn smyrlaætlanin er komin so langt, at ikki vendist aftur!

Undir viðgerðini í landsstýrinum varð sagt, at tað kundi byggjast ein Smyril, sum var nógv bíligari enn tann, sum nú fyriliggur og kortini lúkar tey krøv, ið ferðafólk seta til eitt slíkt skip! Eitt nógv bíligari skip má geva pláss fyri, at verkætlanir í oynni kunnu halda fram?

Verður hildið fast við verandi ætlan, er prísurin ómetaliga stórur fyri vanliga borgaran í Suðuroy. Øll útbygging og menning annars av Suðuroy verður steðgað. At fáa eitt ferðamannaskip, sum lúkar tey krøv, ferðafólk seta til eitt slíkt skip, og útbygging av Suðuroy (berghol og havnarbygging) kann fara í gongd, eigur tað ikki at prioriterast sum nr. 1??? Tað kundi verið áhugavert at fingið at vita frá Bjarna Djurholm, um hetta var ein møguleiki!

Sum vanlig ferðafólk eru vit góð við Smyril og ynskj vit eitt nýtt skip, sum er nakað størri enn hesin og gevur góðar umstøður til tey ferðandi og teirra bilar. Hetta verið seg vanlig ferðandi, sjúk ella brekað! Um túrurin varar 2 tímar ella eitt korter minni, hevur ikki tann stóra týdningin, bert ferðatíðin kann halda.

Hetta ger hon ikki í dag. Hví???

Er orsøkin ikki tann, at núverandi Smyril eisini verður brúktur til fiskaflutning??? Tí vanliga fraktflutninginum skal sjálvandi vera pláss fyri!

Mín spurningur er sostatt (vildi fegin at fólk komu í bløðini og søgdu sína meining) eiga vit at byggja eitt skip, sum eisini skal føra nógvan fiskafarm millum Suðuroy og Havnina, umframt at vera eitt ferðamannaskip??? Fer hesin flutningur, sum hann ger í dag, at verða orsøkin til, at tú ongantíð veit nær Smyril siglur? Er hetta tað vit vilja við einum nýggjum Smyrli?

Vinnulívsmenn í Suðuroy kunnu heldur ikki vera so stuttskygdir, at teir framhaldandi ætla at føra sína framleiðslu um keikantin í Havn?

Er tað yvirhøvur uppgávan hjá Strandferðsluni at átaka sær tann stóra fiskaútflutning, sum vónandi fer at koma úr Suðuroy? Hesin eigur sjálvandi at verða útfluttur beinleiðis úr Suðuroy!

Vinnulívsmenn siga, at hetta saktans kann lata seg gera. Ein slíkur flutningur eigur møguliga at samskipast við útflutning norðanfjørðs.

Við einari djúphavn í Vági verður ikki tørvur á einum stórum Smyrli at flyta fiskin til Havnar at venda.

Hugsa vit okkum, at ein Smyril, sum er 121 (135?) metrar langur, verður bygdur, skal hesin sum sagt hava eina nýggja ferjulegu! Hendan verður allarhelst bygd á Drelnesi. Men verður hugsað um teir trupulleikar sum núverandi Smyril hevur vetrarhálvárið við bryggjuna á Drelnesi, stúri eg fyri, at ein nýggj ferjulega til eitt so stórt skip verður ein endurtøka av Skopun, sum aldrin fær ein enda! Hetta hevur ein av manningini (PDN) so staðiliga mint á í bløðunum.

Fiskaútflutningurin, sum í dag fer eftir Hovsegg, er langt oman fyri tað, sum er forsvarligt. Hvussu verður støðan um eggina, tá kanska 30 til 70.000 tons skulu sama veg til nýggja Smyril? Koyrast skal eftir einum samferðslukervi, sum er ómetaliga lítið útbygt, síðan vegurin millum Vág og Tvøroyri varð bund in saman í 1956. Eiga vit ikki nú – áðrenn tað er ov seint – at taka í egnan barm og viðgera støðuna annarleiðis, nú vit vita hvørji fíggjarlig kort, Føroya landsstýrið hevur spælt út?

Tað ganga vónandi ikki nógvir mánaðir til útflutningurin úr Vági er fleirfaldaður!

Man hesin útflutningur ikki vera komin í eina fasta legu, áðrenn nakar nýggjur Smyril kemur at sigla?

Hvat skulu vit tá gera við ein Smyril, sum er alt ov stórur til vanligan ferðafólkaflutning?

Út frá hesum vil eg heita á Føroya landsstýri um at byggja ein Smyril av hóskandi stødd og sum er vælegnaður til ferðafólkaflutning millum Havnina og Suðuroy!

Fraktflutningurin er ein akuttur trupulleiki, sum má loysast NÚ!

Møguliga kann Strandferðslan loysa henda flutning fyri fyrst, men verður neyðugt við einum serligum skipi til endamálið!

Út frá hesum verður mítt uppskot: Lat okkum fáa ein bíligari Smyril, men sum lúkar tørvin, ferðafólk og bilførarar seta til eitt slíkt skip og byrjið upp á tær uppbyggingar, sum eru lívsneyðugar fyri at suðuroyingar framhaldandi kunnu búleikast í Suðuroy. Stuðlið eini havnarútbygging í Vági NÚ! Og byrjið upp á bergholið millum Hov og Øravík eftir summarsteðgin!

Vónandi kann henda grein verða upplegg til eitt orðaskifti um tann stóra leiklut, ein nýggjur Smyril hevur í framtíðar Suðuroy, bæði so og so!

# Nú er nokk svansað!

**Jóanes N. Dalsgaard**
*23.07.2001*



Fremstu fyritreytirnar fyri góðari lóggávu eru góðir og reiðiligir lóggevarar og ein góð stýrisskipan.

Í Føroyum hava vit eina stýrisskipan, sum gevur lóggevarunum ógvuliga víðar ræsur, tá tað snýr seg um lóggávu. Ongastaðni í stýrisskipanarlógini stendur, at løgtingslimir ikki mugu misnýta vald sítt til at geva sær sjálvum ovurhonds fyrimunir framum aðrar borgarar. Einasta trygdin ímóti tílíkari misnýtslu er tí, at vit hava góðar og reiðiligar lóggevarar. Men tað hava vit ikki!

Fyrst verður málið um eftirløn til landsstýrismenn lirkað ígjøgnum Tingið, í teirri vón, at almenningurin ikki fór at fáa frænir av svansinum. Tá so málið kemur alment fram, er tað eingin løgtingslimur, sum hevur skilt, hvat tað er, tey hava lóggivið um. Niðurstøðan av hesum má vera, at antin hava vit óreiðiligar løgtingslimir yvir ein kamb, ella eru tey, øll sum ein, út av lagi dugnaleys og fávitskut. Undir øllum umstøðum eiga dagar teirra, sum lóggevarar Føroya fólks at vera taldir. Út við teimum til næsta val!

Tí eiga vit heldur ikki at lata sitandi løgting svansa framhaldandi. Seinasta nýggja er uppskotið um at seta eina "óhefta" nevnd at áseta lønir og eftirlønir hjá løgtings- og landsstýrismonnum. Vit vita nú, at sitandi tinglimir yvir ein kamb eru óreiðiligir, og tískil er endamálið við hesari "óheftu" nevnd ivaleyst bara at tryggja Helenu, Høgna og øllum hinum ein feitan nevndarsess, nú tey øll vera vrakaði á næsta vali.

Nei einki skulu vit hava nakra "óhefta" nevnd omanfyri okkara fólkavalda Løgting. Løgtingið er og skal vera evsti myndugleiki í Føroyum. (Er tað ikki júst hetta Høgni Hoydal hevur tútað føroyingum oyruni full av síðani hann kom í landsstýrið?) Ásannandi, at tað ber til at manna eitt løgting við 32 ryggja- og samvitskuleysum kraddarum, mugu vit ístaðin broyta stýrisskipanarlógina soleiðis, at møguleikin at gera sær dælt av ognum Føroya fólks ikki longur er til fyri Løgtingið. Ein tílík broyting skal fyrst og fremst styggja hálv- og heilkorrumperaðar politikaraspírar burtur frá uppstilling. Í øðrum lagi skal broytingin tryggja, at villist onkur óreiðiligur blóðsúgvari kortini inn um tinggátt, so skulu møguleikar hansara/hennara at gera sær dælt av fólksins ogn vera so smáir sum gjørligt.

Broytingin, sum eg her sipið til, er einføld. Hon snýr seg um, at eitt sitandi løgting ásetir lønarviðurskiftini hjá næst komandi løgtingi. Beint eftir løgtingsval skal nývalda tingið góðtaka ella vrakað ásetingina hjá fráfarna tingi. Ein líknandi regla er í amerikonsku grundlógini, so duga løgtingsmenn og –kvinnur ikki at hugsa sjálvi, so kunnu tey fáa okkurt skilafólk at týða regluna úr enskum. Týðing av útlendskum lógum er kortini vanligasti lóggávuháttur í Føroyum.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!